Tinganes 1673

Arne Thorsteinsson

Tinganes við teimum fornminnum, har eru, hevur altíð verið eitt av hjartamálum Sverra. Í antikvariska virki sínum hevur hann lagt stóran dent á at varðveita Tinganes m. a. við at fáa í lag tær víðfevndu uppmátingar, sum Kunstakademiets Arkitektskole gjørdi í 1959 (Jessen 1960), og síðan arkitektkappingina í 1969, sum var støði undir byggisamtyktini fyri gomlu Havnini í 1972. Somuleiðis við luttøku síni í teimum umvælingararbeiðum, sum farin eru fram á Tinganesi. Eisini í rannsóknar- og granskingarstarvi sínum hevur Sverri víst Tinganesi stóran ans og hevur m. a. í prýðiligu bók síni um Havnar kirkju lýst søguna hjá teirri kirkju, sum stóð úti á Reyni (Dahl 1968).

Hesin alskur til Tinganes og umhvørvini har kemur ikki av ongum. Í næstan allari Føroya søgu hevur Tinganes — tingstaðurin og handilsstaðurin — verið miðdepilin í øllum verðsligum viðurskiftum her á landi, soleiðis sum Kirkjubøur var tað í andaligum viðurskiftum í miðøld. Longu í Føroyingasøgu verður tingstaðurin umrøddur, og vit kunnu ætla, at tað árliga tingið longu tá hevur drigið ein ávísan marknað at sær. Hesin ætlaði marknaður hevur helst bert verið tann part av sumrinum, tá fólkið var saman til ting. Onkuntíð í miðøld hevur hesin marknaður fest seg í ein handilsstað burturav, sum hevur havt fastar vørugoymslur í pakkhúsum, sum bygd hava verið úti á Tinganesi. Lucas Debes (1673:277) sigur frá gomlum fólki, at hamborgararnir vóru teir fyrstu, sum høvdu teirra »stabel« har. Er tað rætt, hava handilshús ikki verið bygd á Tinganesi fyrr enn tíðliga í 16. øld. Fyri Havnina sum bý hevur handilsstaðurin havt avgerandi týdning. Tá ið Húsagarður er undantikin, hevur

eingin búseting verið í Havn, fyrr enn tey fyrstu handilshúsini vórðu bygd. Tað fólk, sum tá settist niður í Havnini, var ognarleyst og hevði so statt ongan tilverumøguleika í vanliga føroyska samfelagnum. Tilvera teirra var grundað á tað arbeiði, sum fáast kundi við handilin, og seinri við verjuna, umframt tað, tey kundu vinna sær við útróður og við ullarvirking. Vegna ófullfíggjað keldutilfar vita vit tó sera lítið um ta elstu søguna hjá handlinum og Havnini. Men tá ið skrivaða keldutilfarið í 17. øld gerst ríkiligari, finna vit ein bý býttan í tvíningar. Úti á Tinganesi er rættur og fyrisiting við húsum løgtingsins, fútahúsum og fútans leigubúð, har er handilin við sínum pakkhúsum og sethúsum keypmansins, og har er kirkjuvaldið við kirkju, skúla og frá uml. 1630 prestagarði. Alt hetta verður av trygdarorsøkum innigirt í tí skansanum, sum bygdur varð tvørtur um reynið innan fyri Reynagarð. Innan fyri Tinganes, báðumegin ósan og út gjøgnum Gongina, finna vit sethúsini hjá vanligu borgarunum, teimum sum tæna skuldu stovnunum úti á Tinganesi.

Seint á kvøldi tann 30. januar 1673 kom eldur í keypmansstovuna á Tinganesi. Á loftinum lógu 150 pund av krúti, sum sprongdist, og tað festi í grannahúsini við tí úrsliti, at meginparturin av teimum bygningum, sum á Tinganesi vóru, brunnu í grund. Keypmaðurin varð ákærdur fyri at hava ábyrgdina av eldsbrunanum, og menn hava eftirsíðan havt illgruna um, at keypmaðurin við vilja hevur sett eld á fyri at forkoma handilsbókum sínum, sum kundu havt prógvað óregluliga virksemi hansara (Andersen 1895: 300). Vit vita lítið um rættarmálið móti keypmanninum, tí hann var farin av landinum, áðrenn hann varð stevndur og sýtti fyri at møta á løgtingi. Kanska er málið tí komið fyri rættin í Keypmannahavn. Her var tó ikki ætlanin at kanna øll viðurskifti í sambandi við eldsbrunan, men heldur at kanna eftir, hvat tað keldutilfar, vit hava um eldsbrunan, kann siga okkum um, hvørjir bygningar vóru á Tinganesi undan eldinum, og hvar teir stóðu.

Vitan okkara um húsaviðurskiftini á Tinganesi undan eldsbrunanum stava frá húsasýnum í 1619—20, 1627 og 1670, og vitnisfrágreiðing, sum keypmaðurin gav um eldsbrunan á løgtingi í 1673, áðrenn hann fór av landinum. Hetta tilfar er alt at finna í tingbókunum, har spjaddar umrøður av ymsum húsum ymsar tíðir

somuleiðis eru at finna. Húsayvirlitini frá 1619—20 og 1673 hava verið viðgjørd av N. Andersen (1895:25,290) og Louis Zachariassen (1959—61:269), og verða tey vanliga umrødd, sum vóru tey fullfíggjað yvirlit yvir allar bygningar á Tinganesi. Hetta er ikki so. Í 17. øld stóðu á Tinganesi bygningar, sum handilin brúkti, men kongur átti, bygningar, sum handilin sjálvur átti, bygningar, sum fútin brúkti, men kongur átti, bygningar, sum fútin sjálvur átti, tinghúsið, sum landið átti, og har umframt kirkjan, skúlin og Reynagarður, sum ikki verða umrødd í teimum yvirlitum, ið her eru nevnd. Yvirlitini frá 1619—20 (Tingbókin 1615—54:110 og 137) vórðu gjørd í sambandi við, at føroyahandilin varð tikin frá bergenska handilsfelagnum og latin íslendska handilsfelagnum í Keypmannahavn. Hesi yvirlit umrøða bert brek á kongsins húsum, sum bergenska handilsfelagið skal lata húsabót fyri. Yvirlitið frá 1627 (Tingbókin 1615—54:207) er somuleiðis gjørt fyri at vísa á brek og tær ábøtur, sum íslendska handilsfelagið hevur gjørt, tí felagið fekk 100 gyllin frá bergenska felagnum til at bøta um handilshúsini við. Einki av hesum yvirlitum er sostatt fullfíggjað, hvørki yvir handilshúsini á Tinganesi ella yvir allar bygningar, sum stóðu á Tinganesi í 1620-árunum. Yvirlitið frá 1670 (Løgtingsbókin 1666—77:100—102) er tað næsta, vit koma einum fullfíggjaðum yvirliti, tí hetta er heildarlýsing av »K. M. Huse her udi Thorshafn, som Landfogeden og Købmanden udi brug haver«, og harumframt verða umrøddir teir bygningar, sum fútin sjálvur eigur. Tó finna vit ikki í hesum yvirliti eitt nú tinghúsið. Yvirlitið frá 1673 (Løgtingsbókin 1666—77:212—13) er í vitnisfrágreiðing keypmansins, Peter Rasmussøn, um eldsbrunan. Her roknar keypmaðurin upp teir bygningar, sum fórust í eldsbrunanum, og teir bygningar, ið eftir stóðu.

At heldur ikki hetta yvirlit er fullfíggjað, sæst lættliga við samanburði við aðrar keldur. Vitnisfrágreiðing keypmansins skal tó verða løgd til grund fyri hesi viðgerð.

Flestu bygningarnir, sum ikki brunnu, eru at finna í yngri keldum, t. d. í húsasýni frá 1709 (Zachariasen 1952:32—33 og 45—51), og eru avmerktir á elsta korti av Havnini, kortinum hjá

Rasmus Juel frá 1710 (mynd), og kunnu vit so statt í fyrsta umfari fáa hesar bjargaðu bygningar staðarfestar.

Fyrst er at gera sær greitt, hvørji hús vóru á Tinganesi frá Reynaskansanum og úteftir. Úr vitnisfrágreiðing keypmansins kunnu vit seta upp ein lista:

A. Hús, sum brunnu:
1 Leigubúð keypmansins
2 Gomul stokkastova
3 Stokkastova
4 Avgomul stokkastova
5 Krambúðin
6 Stovur keypmansins
7 Bøkjarahús keypmansins
8 Kongsins stova
9 Krúthúsið
10 Landsins tinghús

B. Hús, sum bjargaðust:
11 Bryggihús keypmansins
12 Munkastovan
13 Leigubúðin
14 Vevarastovan

C. Hús, sum keypmaðurin ikki nevnir:
15 Bryggihús fútans
16 Ognarstova fútans
17 Kirkjan
18 Skúlin
19 Reynagarður

Harnæst skal verða gjørt upp, hvat vit vita um hvørt einstakt hús:

A. Hús, sum brunnu.

1. *Leigubúð keypmansins* var eftir frágreiðing keypmansins frá 1673 bygd á ein lítlan kjallara og hevði ein kova. Í sýninum frá 1670 verður sagt, at leigubúðin stutt síðan er endurreist, og at kovin

1. mynd. *Tórshavn 1710, eftir Rasmus Juel.*

er bakarahús. Henda leigubúðin hevur óivað verið brúkt til inntøkurnar av aðalsjørðini, sum handilin hevði í hondum ella hevði ognað sær.

2. *Gamla stokkastovan* stóð undir liðini á Leigubúð keypmansins, »nest ved Landskildboden« og hevði kjallara. Í lýsingini frá

1670 verður sagt, at hon varð bygd av Hans Sørensøn. Hann var keypmaður umleið 1643.

3. Næsta stokkastovan, sum keypmaðurin nevnir, hevði eisini kjallara. Hon verður í 1670 nevnd *Nýggja stokkastovan* og sagt verður, at hon stendur »paa den anden Side Gangen til Stranden«. Hendan stokkastovan hevur sostatt ikki staðið beint undir liðini á hinari.

4. Hin *avgamla stokkastovan*, sum keypmaðurin harnæst nevnir, verður søgd at hava verið »meget gammel og forrotnet«. Í lýsingini frá 1670 stendur, at henda stokkastovan stendur undir liðini á húsum fútans, »nest op til Fogdens Hus«. Tað er ikki óhugsandi, at hetta er stokkastovan, sum bygd varð í 1627, sum lýst í yvirlitinum tað árið, í staðin fyri eina eldri stokkastovu, sum verður nevnd bæði í 1619 og 20. Í hvussu so er, kann hvørgin av hinum stokkastovunum vera tann, sum bygd varð í 1627.

5. *Krambúðin* er sjálvsagt mangar ferðir nevnd í tingbókunum, men í ongum føri fáa vit at vita, hvar krambúðin stendur í mun til hini húsini, uttan í yvirlitunum frá 1670 og 1673, har røðin í upprokningini gevur eina ábending á, at krambúðin hevur staðið undir liðini á stovum keypmansins.

6. *Stovur keypmansins.* Í frágreiðingini nevnir keypmaðurin »begge Kiøbmandens Stuer med Kontoer og Sualen«. Í lýsingini frá 1670 verður skilt ímillum Lítlustovu og Stórustovu við skrivstovu og svala. Stórastova hevði eisini ein lítlan kjallara. Onnur hendan stovan varð bygd av bergenska handilsfelagnum, sum sjálvt átti hana, og er hon tí ikki at finna í yvirlitinum frá 1619 og 1620. Í 1621 varð hon tó sýnað og virðismett, óivað tí at ætlanin var, at kongur skuldi keypa hana (Tingbókin 1615—54:147—48).

Í vitnisfrágreiðingini frá 1673 greiðir keypmaðurin frá, at hann fór úr húsum sínum »op i Fogedens Hus«, seinni fór hann úr húsum fútans »neder udi« sína egnu stovu. Á sama hátt sigur húskallur keypmansins frá, at hann úr fútahúsunum fór »ned i Købmandens Hus« og fór síðan »op i Fogdens Stue«. Skilligt er av hesum orðalagnum, at keypmanshúsini hava staðið niðari enn fútahúsini, men samstundis skilst av vitnisfrágreiðingunum, at bæði húsini hava staðið heilt nær hvørjum øðrum, tí bresturin, tá krútið á loftinum

hjá keypmanninum brast, »omkasted baade Bord, Folk og alt, hvad i Stuen var« inni hjá fútanum. Samstundis sló eldurin inn gjøgnum vindeygað og veggin í fútahúsunum og fylti stovuna við royki og eldi.

7. *Bøkjarahús keypmansins.* Í vitnisfrágreiðingini frá 1673 sigur keypmaðurin, at eitt lítið bøkjarahús hansara brendi. Hetta bøkjarahúsið er ikki at finna í yvirlitunum frá 1670. Í 1627 verður nevnt eitt bøkjarahús, sum er sett ov nær ráðstovuni, men neyvan er hetta sama húsið. Heldur er bøkjarahúsið bygt millum 1670 og 1673, og samanbera vit røðina í báðum yvirlitunum, er tað ikki óhugsandi, at bøkjarahúsið hevur staðið við stórustovu keypmansins, har tað í 1670 verður sagt, at eitt opið pláss er, har ein kovi hevur staðið, og har rúm er fyri einum góðum húsi.

8. *Kongsins stova.* Umframt tey brendu handilshúsini nevnir keypmaðurin í vitnisfrágreiðing síni frá 1673 eisini, at kongsins stova við køki og svala uttanfyri, sum fútin brúkti, er niðurbrend. Hendan stova, sum fútin búði í, og tí mangan verður nevnd fútans stova, er fleiri ferðir nevnd í tingbókunum, fyrstu ferð í 1623 (Tingbókin 1615—54:174), tá ið sagt verður frá, at gamla kongsstovan er niðurdottin, og at fútin í 1622 hevur latið hana byggja upp aftur. Í 1629 eru takið og skorsteinurin farin av vindi, og fútin hevur latið hetta gera aftur (Tingbókin 1615—54:226). Í 1656 hevur fútin aftur tikið húsini niður, tí tey vóru í so vánaligum standi, og hevur bygt nýggj hús í staðin (Løgtings- og vártingsbókin 1655—66: 61—62). Í hesum sambandi skilst, at kongsins stova mest var ætlað at hýsa kongligum umboðsmonnum, sum komu til Føroya; men vanliga búði fútin í henni og nýtti hana eisini til avhoyringar, semingsroyndir o. t.

Sum áður frágreitt hevur kongsins stova staðið undir liðini á teirri avgomlu stokkastovuni nr. 4 og tætt oman fyri stovur keypmansins.

9. *Krúthúsið* varð bygt í 1670, og stóð tað í *Lítla skansa* (Løgtingsbókin 1666—77:132). Hesin Lítli skansi er annars lítið umrøddur í tingbókunum, og einki verður sagt beinleiðis um, hvar hann var; men eyðvitað hevur hann verið heilt nær teimum brendu húsunum. Tó skilst av vitnisfrágreiðing loytnantsins, Claus Becker

(Løgtingsbókin 1666—77:211), at krúthúsið í Lítla skansa hevur staðið nakað burtur frá keypmanshúsunum, har eldurin íbirtist. Loytnanturin var lagstur, tá ið hann hoyrdi brestin av krútinum á keypmansloftinum. Hann fór upp og trummaði eftir fólki, og tá hann hevði verið eina løtu úti á Tinganesi og sæð, at eldur var ikki komin í krúthúsið, fór hann heim aftur í Havnina og bað menn draga bát, fyri á tann hátt at koma fram og bjarga tí, sum var í krúthúsinum. Hetta var tó hildið at vera ógjørligt fyri illveður. Claus Becker fór so út aftur móti Tinganesi, og tá ið hann var komin hálva leið, sprongdist krúthúsið. Í krúthúsinum vóru m. a. 2200 pund av krúti og 97 løddar handgranatir (Løgtingsbókin 1666—77:220—21).

Sostatt kann krúthúsið ikki hava verið millum tey hús, sum stóðu keypmanshúsunum næst, og sum eldurin beinan vegin festi í.

Í 1709 er ein *Lítli skansi* umrøddur (Kommissionsbetænkningen 1709—10:98), og sæst hesin skansi eisini á kortinum hjá Rasmus Juel frá 1710 (1. mynd) uttan fyri handilshúsini á tí stað, har tað ytsta húsið á Tinganesi í dag stendur. Tað er ikki óhugsandi, at hetta er sami Lítli skansi, sum var í 1673, tí longu í 1658 sæst, at skansi hevur verið uttarlaga á Tinganesi. Hetta árið greiðir eitt vitni í sakarmálinum frá, at hann gekk niðri í skansanum og sá, hvat hendi við Leigubúðina (Løgtings- og Vártingsbókin 1655—66: 142).

10. *Landsins tinghús* er millum tey hús, sum keypmaðurin í vitnisfrágreiðing síni sigur vera brend. Hús, sum nýtt hava verið til tingfundir, eru nevnd fleiri ferðir í tingbókunum við ymsum heitum (Thorsteinsson 1978). Elsta dømi er Ráðstovan, sum var nevnd í tingbókini í 1557 (Tingbókin 1615—54:52); í 1616 verður Tingstovan nevnd (Tingbókin 1615—54:33), í 1617 aftur Ráðstovan (Tingbókin 1615—54:39) og í 1619 Gildisskálin. Í yvirlitinum frá 1627 verður Ráðstovan aftur nevnd og eitt bøkjarahús, sum sett er ov nær henni. Uttan iva eru Ráðstovan, Tingstovan og Gildisskálin sama húsið. Av umrøðuni frá 1619 sæst, at kongur átti Gildisskálan, og at fútin hevði ræði á húsinum; men løgtingið skilaði sær rætt til at nýta húsið, tá ið fútanum ikki tørvaði tað.

Í 1658 finna vit landsins hús umrøtt, og í 1663 landsins tinghús



2. mynd. *Tórshavn 1709, eftir N. C. Hals. Det Kongelige Bibliotek.*

(Løgtings- og Vártingsbókin 1655—66:141 og 267—68). Skilligt er, at landið nú hevur ognað sær húsið, og av umrøðuni í 1663 skilst, at landið eisini hevur skyldu at halda húsið, tí fútin krevur løgtingið eftir 67 gyllinum og 6 skinnum fyri umvælingararbeiði, sum hann hevur latið gera. Aftur í 1670 verður tinghúsið nevnt Ráðstovan (Løgtingsbókin 1666—77:74), og sum nevnt brennur landsins tinghús í grund í 1673. Í øllum hesum umrøðum er einki, sum bendir á, hvar tinghúsið hevur staðið, uttan tað, at tað brennur saman við hinum húsunum.

B. Hús, sum bjargaðust.

Í vitnisfrágreiðingini nevnir keypmaðurin 3 ella 4 hús, sum eldur ikki kom í. Onkur av hesum húsum, eins og fleiri hús, sum keypmaðurin als ikki nevnir, eru at finna í yngri keldum, m. a. á kortinum hjá Rasmus Juel frá 1710 (1. mynd), og í húsalýsingini frá 1709 (Zachariasen 1952:32—33 og 45—51), og onkur av teimum standa uppi enn í dag.

11. *Bryggihús keypmansins* er fyrstu ferð nevnt í yvirlitinum frá 1670, har tað verður sagt at standa millum bryggihús fútans og ognarstovu hansara. Sambært lýsingini frá 1709 var bryggihúsið 11 alin langt og 8¼ alin breitt. Tað stóð tá millum Leigubúðina og Nýggja pakkhús, sum varð bygt í 1703 og seinri er vorðið nevnt Sjóbúðin.

12. *Munkastovan* er eftir vitnisfrágreiðing keypmansins frá 1673 »et gammelt Hus, som kaldes Munche Stuen med en Kielder under, og en Koffue ved samme Hus, som ganger tillige langs ved for'ne Munche Stue og Kongens Landskyldbod«. Keypmaðurin brúkti tá Munkastovuna sum pakkhús.

Í húsasýninum frá 1709 er Munkastovan søgd at vera »et nyt Vaanhus bagved Landskyldboden«, bygd í 1705, 7 alin long og 8 alin breið. Hon sæst eisini, føst í Leigubúðini, har hon enn í dag stendur, á kortinum hjá Rasmus Juel frá 1710, hóast teksturin á kortinum er skeivur. So stór umbygging er farin fram í 1705, at teir meta húsið at vera nýtt, men ætlandi er tað bert viðurin, sum er endurnýggjaður. Kjallaramúrarnir og grótmúraðu veggirnir eru uttan iva eldri.

Munkastovan er fyrstu ferð nevnd undir hesum navni í lýsingini frá 1670, men í yvirlitunum frá 1619 og 20 er nevnt eitt hús, *Loftið*, sum ikki fær verið annað enn Munkastovan, tí ein svala gongur tá fram við Loftinum og Garðsstovuni, og Garðsstovan var, sum seinri nevnt, vestari endi á Leigubúðini. Í 1619 og 20 er eisini nevndur kjallari undir Loftinum.

13. *Leigubúðin* verður mangan í keldunum nevnd Kongsins leigubúð fyri ikki at blanda við leigubúð keypmansins. Leigubúðin varð brúkt av fútanum at taka ímóti kongsinntøkunum, jarðarleigu, kongsskatti, bótum v. m. Keypmaðurin sigur í 1673, at Leigubúðin kom óskalað undan eldsbrunanum. Á kortinum hjá Rasmus Juel frá 1710 (1. mynd) er hon nevnd Landfogedens Bod og er avmerkt á tí stað, har hon enn stendur, tó umbygd. Í húsasýninum frá 1709 er Leigubúðin søgd at vera 25$^{3}/_{4}$ alin long og 7$^{3}/_{4}$ alin breið. Hon er sundur skilað í tvey rúm, og upp at henni er múraður ein kovi, 10 alin langur og 3$^{1}/_{2}$ alin breiður. Hesin kovi sæst á kortinum hjá Rasmus Juel at vera við eystara enda á suðurvegginum.

Leigubúðin er gjølliga lýst í sýninum frá 1670, og verður har nevnt, at vestari partur av Leigubúðini áður varð nevndur *Garðsstovan*. Leigubúðin er ikki nevnd í yvirlitinum frá 1619 og 20, men er nevnd í øðrum sambandi fyrstu ferð í 1619 (Tingbókin 1615—54:97). Tá var Garðsstovan eitt av teimum húsum, sum handilin brúkti, og er hon tí at finna í yvirlitunum frá 1619 og 20.

14. *Vevarastovan*. Í vitnisfrágreiðing síni frá 1673 sigur keypmaðurin m. a. frá teirri vøru, sum var í hinum handilshúsunum, ið ikki brunnu. Her nevnir hann eisini vøru í Veffuer Stuen. Vevarastovan er fyrstu ferð nevnd í 1667 (Løgtingsbókin 1666—77: 21—22), tá ið genta sorenskrivarans, Bergit Jensdatter, var noydd at búgva eina tíð hjá fútanum, »da Veffuer Huusett blev neder brutt«. Í 1671 sæst, at Jonas Trellund, sum hevði havt handilin í hondum fyri Gabel, hevur átt Vevarahúsið (Løgtingsbókin 1666—77:144—45). Árið fyri hevur fútin Gabels vegna lagt hald á húsið fyri skuld. Helst hevur Vevarastovan staðið somikið burturfrá, at tað ikki hevur havt nakran áhuga í sambandi við eldsbrunan, men hon kemur ikki fyri aftur í yngri keldum.

C. Hús, sum keypmaðurin ikki nevnir.

Innan fyri virkisgarðarnar stóðu fleiri hús, sum keypmaðurin als ikki nevnir í vitnisfrágreiðing síni, annaðhvørt av óvart ella tí tey stóðu soleiðis fyri, at óneyðugt var at nevna tey. Hetta eru sostatt hús, vit mugu rokna við, eru komin óskalað undan eldsbrunanum.

15. *Bryggihús fútans.* Av yvirlitinum frá 1670 sæst, at umframt stovuna hevur kongur átt eitt bryggihús, sum fútin brúkti. Hetta bryggihús hevði eitt kamar í endanum og stóð undir liðini á bryggihúsi keypmansins. Helst er hetta húsið ikki brent, men tað kemur tó ikki fyri aftur í yngri keldum.

16. *Ognarstova fútans* er fyrstu ferð umrødd í 1666, tá ið fútin Søffueren Pedersøn keypti hana frá fyrrverandi fútanum Johan Heideman (Løgtingsbókin 1666—77:9). Í yvirlitinum frá 1670 verða hesi hús upproknað: ein lítil nýggj stova, sum fútin hevur bygt í 1667, har ein lítil kovi hevur staðið, og harumframt er ein lítil ølkovi og ein hjallur ella salthús. Fútin hevur tá gramt seg fyri sýnsmonnunum, at hann hevur ov lítla húsarúmd, og einki pláss er at byggja á, tí bryggihús keypmansins stendur millum lítlu stovu og bryggihús hansara. Í 1674 nevnir fútin, at hann býr í húsum løgmans, men hóast hetta er líkt til, at ognarstova hansara er komin óskalað frá eldsbrunanum, tí samstundis nevnir hann, at hann hevur lænt keypmanninum hús síni. Á tingi verður avgjørt, at keypmaðurin framvegis má hava hesi hús, til ein onnur krambúð skjótast gjørligt er bygd, tí einki annað hús er at nýta til krambúð (Løgtingsbókin 1666—77:231—34). Ognarstovan er tó horvin fyri 1710, tí á kortinum hjá Rasmus Juel er hon ikki at finna.

17. *Kirkjan* er greiniliga viðgjørd av Sverra Dahl (1968:3—14), men okkurt kann skoytast upp í til greiniligari staðarfestingar. Hendan kirkjan, sum ikki man hava verið fyrsta kirkjan í Havn, varð bygd úr stokkum í 1609. Í kirkjusýni frá 1709 er hon søgd at vera 24½ alin long, og harumframt er forkirkjan 7 alin long. Breiddin var 10 alin (Kommissionsbetænkningen 1709—10: 109—110). Á kortinum hjá Rasmus Juel frá 1710 sæst kirkjan at standa norðan fyri Leigubúðina og Munkastovuna. Millum hesi hús og kirkjuna hevur verið kirkjugarður. Í lýsingini frá 1670 verður



3. mynd. *Uppmáting av kirkjugarðinum 1781. Landsskjalasavnið.*

sagt, at vatn setur inn í vestara enda á Leigubúðini, Garðsstovuna, úr kirkjugarðinum, og í 1709 verður nevnd ein inngongd frá kirkjugarðinum inn á loftið í Munkastovuni.

Lýsing og skitsa av kirkjugarðinum frá 1781 (Landsskjalasavnið) gevur neyvari upplýsingar um, hvar kirkjan hevur staðið í mun til hini húsini (3. mynd). Størri parturin av kirkjugarðinum var 36 alin langur, og fevnir hetta um alla longdina á Leigubúðini og Munkastovuni; hann var 12½ alin breiður, og norðan fyri hann hevur kirkjan staðið. Vestari endi man hava staðið áraka vestara enda á Munkastovuni. Vestan fyri kirkjuna var ein lítil partur av kirkjugarðinum, bert 8 ferðir 8 alin og vestari aftur ein øskudungi.

Sunnan fyri hetta øki og vestan fyri størra partin av kirkjugarðinum var bratt niður av hamrinum, men hetta varð í 1763—64 uppfylt og lagt aftur at kirkjugarðinum. Í hesum nýggja øki var tað gjørligt at seta kistu oman á kistu.

18. *Skúlin* sigst at vera bygdur í 1628 (Zachariasen 1959—61: 269). Í 1630 varð hann sýnaður og mettur at hava kostað 100 gl. Hesin skúlin varð bygdur, tí tann gamli skúlin var niðurdottin (Tingbókin 1615—54:232). Í 1658 vóru ætlanir um at broyta skansan, og tað hevði havt við sær, at skúlin varð burturtikin (Løgtings- og Vártingsbókin 1655—66:104). Í 1659 er skúlin enn ikki burturtikin (Løgtings- og Vártingsbókin 1655—66:188—89). Tá verður sagt, at umframt skúlan stendur eisini ein hjallur í vegnum fyri skansanum. Enn í 1661 stendur »en Del Huse og Rusch« í vegnum fyri skansanum (Løgtings- og Vártingsbókin 1655—66: 227). Skansabyggingin tykist nú at hasa av. Aftur í 1667 verður skúlin nevndur í sambandi við eitt rættarmál (Løgtingsbókin 1666—77:26), og líkt er til, at skúlin ongantíð er niðurtikin, men hevur staðið órørdur á sama stað bæði fyri og eftir eldsbrunan í 1673.

Í 1709 var skúlin í sera vánaligum standi (Kommissionsbetænkningen 1709—10:147). Á kortinum hjá Rasmus Juel frá 1710 er skúlin beint vestan fyri forkirkjuna, á leið har sum gomlu Fútahúsini nú standa.

19. *Reynagarður* verður hildin at hava verið bygdur av prestinum Hans Rasmussøn millum 1625 og 1628 (Degn 1942:168). Húsini vóru 4 lonir uttan um ein ferhyrntan steinsettan garð, óivað eftir donskum siði. Ilt er tó at trúgva, at hesar 4 lonir, so ymiskar tær eru í byggihátti, føroysk stavbygging, donsk bindingsverksbygging og norsk stokkabygging, skula vera bygdar samstundis; men her verður ov drúgt at royna at greina byggisøguna á Reynagarði. Nóg mikið er í hesum sambandi at gera vart við, at Reynagarður er væl staðarfestur og millum annað er at finna á kortinum hjá Rasmus Juel frá 1710. Tvær av lonunum eru niðurtiknar, men suðurlonin og vesturlonin standa enn uppi.

Burtur úr tí, tingbøkurnar siga um teir einstøku bygningarnar, skuldi verið gjørligt at fingið eina hylling á, hvussu teir brendu bygningarnir stóðu í mun hvør til annan og í mun til teir bygningar, sum ikki brunnu. Men latið okkum fyrst hyggja at teimum uppskotum til staðarfestingar, sum áður eru sett fram. Eftir Louis Zachariasen (1952:32) skal N. Andersen hava sagt, at handilshúsini stóðu »inni á tí lága av Reynunum«. Nú er ikki heilt greitt, hvat hetta merkir, men innan fyri Leigubúðina kunnu tey brendu húsini ikki hava staðið. Millum Leigubúðina og Reynagarð hevði verið ov trongt, tí har var kirkja og kirkjugarður, og beint innan fyri Reynagarð vóru virkisgarðarnir á skansanum, og tað verður fleiri ferðir nevnt í tingbókunum,at handilshúsini standa inni í skansanum (t. d. Løgtings- og Vártingsbókin 1655—66:161—62).

Reynaskansin var bygdur tvørtur um nesið, á leið har sum Skansagarður er, soleiðis at prestagarður, skúli, kirkja og handilshús stóðu innan fyri — sunnan fyri — virkisgarðin, ið sostatt avmarkaði Tinganes inn móti Havnini. Vanligt er at halda, at hesin skansi varð grundaður í 1630 av fútanum Mads Christensen, men í tingbókunum sæst heilt greitt, at Reynaskansin var grundaður í 1645 av fútanum Hans Selmer (Tingbókin 1615—54:352; Løgtings- og Vártingsbókin 1655—66:133). Ein broytingarætlan varð íbirt av fútanum Johan Heideman í 1657 (Løgtings- og Vártingsbókin 1655—66:104), men ætlaðu broytingarnar tykjast ongantíð hava verið gjørdar, m. a. tí prestarnir settu seg ímóti at lata skúlan flyta burtur.

Í 1709—10 var Reynaskansin púra horvin, og sæst hann ikki á kortinum hjá Rasmus Juel.

Onnur orsøk til, at handilshúsini ikki kunnu hugsast at hava staðið millum aðrar bygningar innan fyri Leigubúðina ella innan fyri Reynagarð, eru sjálvar umstøðurnar kring eldsbrunan. Einki sæst í tingbókunum til nakra roynd at steðga eldinum, og í tí harða storminum hevur eldurin lættliga kunna breitt seg, og er ikki sloknaður, fyrr enn einki var eftir at brenna. Sostatt kunnu brendu handilshúsini ikki hava verið innari á nesinum enn Leigubúðin, sum bjargaðist. Einum nýtist bert at hugsa sær, hvat hevði hent, um krúthúsið við sínum 2200 pundum av krúti hevði staðið inni á

Reynaskansanum og var farið í luftina har, beint innan fyri Reynagarð og á markinum til sjálvan býin. Ein onnur fyritreyt fyri, at nakað varð bjargað, er ættin. Hann hevur verið høgur í ættini hesa stormhørðu vetrarnátt, tí annars hevði Havnin øll helst verið uppkolað.

N. Andersen sjálvur førir fram (1895:290—91), at handilshúsini stóðu í einum rað oman eftir vestarumegin á Tinganesi. Eftir eldsbrunan hevur so verið bygt upp aftur í tveimum røðum, sum tað sæst á kortinum hjá Rasmus Juel frá 1710, og skansin er tá fluttur út um handilshúsini, har Lítli skansi var í 1710. Hvaðan N. Andersen hevur hesa uppfatan er ilt at skilja, og nógv talar ímóti henni. Lítli skansi er helst munandi eldri enn 1673, og tó at einki er at ivast í, at handilshúsini undan eldinum hava staðið oman eftir Tinganesi, er tað óhugsandi, at einki skal hava verið bygt eystaru megin á Tinganesi. Tað vóru so nógv hús, sum brunnu, at neyvan kann hava verið pláss til teirra í einum rað. Harafturat verður í sýninum frá 1670 klagað um plásstrot á Tinganesi. Hetta plásstrot var so stórt, at fútin, tá hann í 1671 bygdi sær nýtt pakkhús, noyddist at byggja tað heimi í Havnini (Løgtingsbókin 1666—77:132). Eyðvitað hevur hetta hús ikki verið í vanda í 1673 og verður tí ikki nevnt tá, men sæst at vera brúkt í 1674 (Løgtingsbókin 1666—77: 253—54). Líkt er til, at hetta nýggja pakkhús fútans er tað gamla pakkhúsið »staaende hjemme i Havnen op til Kristen Blasius's hus«, sum verður umrøtt í 1709 (Zachariasen 1952:50—51), stokkabygt 13½ × 9 alin við kjallara og lofti. Í uppskotinum til staðarfestingar av brendu húsunum rokni eg tí við, at tey hava staðið í tveimum røðum oman eftir Tinganesi eins og tey, sum vórðu bygd aftur har. Hetta sæst eisini av tí, at keypmansstovurnar, sum vit vita stóðu heilt tætt við fútahúsini, ikki kunnu hava staðið undir liðini á teimum, tí vit hava greiðu á, hvørji hús har vóru, og tí mugu hava staðið yvir av teimum hinumegin nesið.

Nøkur ár herfyri varð kjallarin í Sethúsunum úti í Havn eystarumegin á Tinganesi útgrivin, og vórðu tá tjúkkar brunafláir funnar, og gevur hetta okkum enn eitt prógv fyri, at bygt hevur verið eystarumegin.

Ein roynd at staðarfesta tey brendu húsini má byrja við at av-



TINGANES 1673 uppskot

1 Leigubúð keypmansins
2 Gomul stokkastova
3 Stokkastova
4 Avgomul stokkastova
5 Krambúðin
6 Stovur keypmansins
7 Bökjarahús keypmansins
8 Kongsins stova
9 Krúthúsið
10 Landsins tinghús
11 Bryggihús keypmansins
12 Munkastovan
13 Leigubúðin
14 Vevarastovan
15 Bryggihús fútans
16 Ognarstova fútans
17 Kirkjan
18 Skúlin
19 Reynagarður

Teknlýsing

Brend hús

Bjargað hús

Bjargað hús sum enn standa

4. mynd. *Tinganes 1673. Uppskot.*

merkja tey hús, sum bjargaðust, og sum vit tí finna staðarfest í yngri keldum. Hetta er gjørt á kortinum, 4. mynd, har tey bjargaðu húsini eru drigin upp við óbrotnari striku. Ivi kann vera um staðarfestingina av nr. 15, Bryggihúsi fútans, og nr. 16, Ognarstovu fútans, hvørjumegin nr. 11, Bryggihúsi keypmansins, tey eiga at vera sett, og nr. 14, Vevarastovan, kann als ikki verða staðarfest. Øll hús fútans tykjast at hava staðið nøkulunda á sama stað, bert við nr. 11, Bryggihúsi keypmansins skotraðum inn ímillum, og er nr. 8, Kongsins stova tí sett beint niðan fyri nr. 16, Ognarstovu fútans. Undir liðini á Kongsins stovu stóð nr. 4, avgamla stokkastovan, sum helst var bygd í 1627. Bæði í húsasýninum frá 1670 og í vitnisfrágreiðing keypmansins frá 1673 eru 4 hús nevnd í júst somu rød. Hesi eru 1, Leigubúð keypmansins, 2, Gamla stokkastovan, 3, Nýggja stokkastovan og 4, avgamla stokkastovan undir liðini á nr. 8, Kongsins stovu. Hesar báðar upprokningar tykjast at byrja í neðra, og er nr. 1, Keypmansins leigubúð, tí sett niðast móti Lítla skansa vestarumegin nesið og nr. 2, Gamla stokkastovan, sum skal standa undir liðini á henni, er sett beint omanfyri. Nr. 3, Nýggja stokkastovan skal standa »paa den anden Side Gangen til Stranden«. Tað er ikki trúligt, at »Gangen til Stranden« skal hava verið vestarumegin á Tinganesi, og er nr. 3 tí sett eystarumegin, har Stokkastovan nú stendur. »Gangen til Stranden« kan tá hava verið annaðhvørt høvuðsgøtan oman millum húsini ella trúligari eitt skot oman fyri stokkastovuna eins og í dag. Nr. 6, Stovur keypmansins, eru settar beint yvir av nr. 8, Kongsins stovu, har sethús keypmansins vóru bygd aftan á eldsbrunan og enn standa, og 5, Krambúðin, beint niðan fyri Stovur keypmansins. Tað, at sagt verður oman í stovu keypmansins og niðan í stovu fútans, merkir helst bert, at keypmansstovan hevur staðið nakað lægri enn Fútastovan og ikki, at hon hevur staðið niðari á nesinum. Beint oman fyri keypmansstovurnar er so nr. 7, Bøkjarahúsið sett. Hvar tinghúsið hevur staðið, er einki grett um, men pláss tykist at vera fyri tí niðan fyri nr. 18, Nýggju Stokkastovuna. At Lítli skansi við krúthúsinum verður hildin at vera sami Lítli skansi, sum í 1710 stóð niðan fyri øll húsini er í samljóði við orðalagið »niðri í skansanum« og við, at eldurin var heldur leingi um at festa í krúthúsið.

Úrslitið av hesi roynd at greina byggingina á Tinganesi undan eldsbrunanum í 1673 gjørdist sostatt eitt uppskot, sum sýnir Tinganes í 1600 talinum, nøkulunda sum vit kenna tað úr seinri tíðum, og eftir hesum at døma hava teir ikki gjørt nakrar stórvegis broytingar, tá bygt var upp aftur eftir eldsbrunan. Helst hava teir bert ruddað upp og bygt oman á grundirnar aftur.

Skaðin var stórur, men sum áður nevnt, var tað ein Guds lukka, at ættin ikki lá inn móti býnum hesa náttina. Ilt er at meta um, hvussu stórur skaðin tá hevði verið. Helst hevði øll Havnin verið upp kolað. Undarligt kortini, at hetta er einasti størri eldsbruni, vit vita um at siga í hesum gamla, tættbygda býi, tá hugsað verður um teir mongu eldsbrunar, vit kenna úr øðrum býum.

BÓKMENTIR

Andersen, N. 1895: Færøerne 1600—1709, København.
Dahl, Sverri, 1968: Havnar Kirkja, Gøtu.
Debes, Lucas, 1673: Færøernes Beskrivelse, Kiøbenhafn.
Degn, A. 1942: Staðanøvn fram við sjónum frá Kirkjubønesi til Hoyvíkar, Varðin, 22. bind: 164—69.
Jessen, Curt von, 1960: Den gamle Bydel i Tórshavn, Arkitekten 23:390—400.
Kommissionsbetænkningen 1709—10, Thorshavn 1934.
Løgtingsbókin 1666—77, givið út hevur Einar Joensen, Tórshavn 1961.
Løgtings- og Vártingsbókin 1655—66, givið út hevur Einar Joensen, Tórshavn 1958.
Petersen, Poul, 1974: Føroyar í søguni I, Funningi.
Tingbókin 1615—54, givið út hevur Einar Joensen, Tórshavn 1953.
Thorsteinsson, Arne, 1978: Ráðstova — Gildisskáli — Tinghús, Mondul 3: 3—10.
Zachariasen, Louis, 1952: Úr Føroya søgu um ár 1700, Tórshavn.
Zachariasen, Louis, 1959—61: Føroyar sum rættarsamfelag 1535—1655, Tórshavn.

SUMMARY

Late in the evening of the 30th January 1673 most of the trading booths and warehouses on Tinganes in Tórshavn were burned to the ground. How they were rebuilt can be seen from a map from 1710 (ill. 1.), but there have been various views as to how the buildings were situated before the fire. An analysis of the source material about the fire and earlier information about the buildings on Tinganes give an indication of how the buildings stood in relation

to each other and to those which were saved. Some of these other buildings are still standing, and most of the others have been identified from later sources. How the destroyed buildings appear to have been situated in relation to those which were saved and to each other is indicated in ill. 4, and the conclusion to be drawn from the examination is that the buildings on Tinganes were rebuilt more or less on the same sites and constructed in approximately the same manner as before the fire.